TING-HELLAN

# Lidnir við avsláttur

**Stjórin í Havnar Timburhandli leggur eina við, at hjá teimum er tíðin við stórum avsláttrum farin**

TINGHELLA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



Frá Heina Fossaa og Havnar Timburhandli skal ein vanligur kundi ikki rokna við at fáa størri avsláttur enn nøkur heilt fá prosent.

Ì seinasta blaðnum fyri páskir verður í greinini ”Very special prise for you” hugt nærri at prísum á vørum í Føroyum.

Analysan hjá Sjúrði Skaale viðger timburhandlar, men hon viðger eisini fleiri aðrar vinnugreinir. Tað er eftir egnum vali, at dentur verður lagdur á timburhandlar í hesari greinini.

### Liðugt

Heini Fossaa, stjóri í Havnar Timburhandli, sigur, at í hansara fyritøku er tíðin við stórum avsláttrum ein farin tíð.

- Við ársbyrjan 2004 settu vit allar okkara prísir niður, og harvið gjørdu vit upp við tíðina, har tað bar til at fáa hesar stóru avsláttrarnar, sigur Heini Fossaa.

Hann sigur, at tað, sum stendur at lesa í greinini í páskablaðnum, ikki ber til longur, men tað hevur borið til at fáa stóran avsláttur.

Avsláttur verður framvegis givin. Bert ikki á sama hátt. Vinnukundar hava aðrar treytir enn privatir kundar. Og tað ber til at fáa ein avlsáttur upp á timbur til kanska eina

- Tað ber til at kjakast um tað er rætt við prísásetingunum, men tað má vera ein munur á teimum ymsu keyparunum, har nakrir keypa nógv og onnur keypa minni, men vit hava oftani tær somu útreiðslurnar, sigur Heini Fossaa.

### Tænastur samlaðar

Sambært Heina Fossaa skyldast teir lægru eindarprísirnir, at aðrar tænastur nú ikki verða roknaðar upp í prísin.

- Àður var tað soleiðis, at tað var fríkoyring og aðrar tænastur knýttar at vøruni. Hetta gav eisini ein stóran mismun. Tú kundi fáa ein stóran avsláttur upp á prísin, um tú ikki nýtti allar tænasturnar, men kundin, sum heintaði sínar vørur hjá okkum, rindaði fullan prís, sigur Heini Fossaa

Hann sigur tað vera ótrúliga torført at fáa fólk at rinda fyri eina tænastu, og tí hevði tað verið lættari, um tænastan var partur av prísinum, men hann sigur, at Havnar Timburhandil hevur valt at gera prísirnar meira gjøgnumskygdar.



*Timbur eins og aðrar vørur verður selt til ymisk fólk til ymsar prísir*

### Balslev vil ikki svara

Feskastu atkomuligu roknskapartølini hjá Havnar Timburhandli og Balslev vísa, at báðir teir stóru timburhandlarnir høvdu í 2003 fleiri milliónir hvør í yvirskoti, men tað ber ikki til at lesa nakað um umsetningin í tí eksterna roknskapinum hjá báðum teimum stóru timburhandlunum.

Meðan Heini Fossá ikki hevur nakað ímóti at svara spurningunum hjá Sosialinum, so er áhugin ikki til staðar hjá Bent á Lava, stjóri fyri Balslev.

- Vit hava eina skipan, men eg ætli mær ikki at gera viðmerkingar til tað í bløðunum, sigur Bent á Lava.

Hann sigur tó, at hann metir kapping vera til staðar í stóran mun í Føroyum. Hesum er Heini Fossaa eisini samdur við honum í.

Hann vil tískil hvørki avsannað ella váttað, at tað ber til at fáa tílíkan avsláttur sum sipað til í greinini í páskablaðnum.

### Kappingarráðið kannar

Kappingarráðið kannaði í 2002 avsláttarskipanirnar hjá føroysku timburhandlum. Kappingarráðið gjørdi ikki nakað víðari við málið, og tað var eingin niðurstøða gjørd um, at tað var avtalað nakað millum handlarnar um prísir.

Kanningin vísti, at allir timburhandlar bjóðaðu stórar avsláttrar og eisini provosión ella bonus til eitt nú byggimeistarar.

Tað ber til at lesa um kanningina á www.kapping.fo

# Ein rættur at diskriminera

**Tað er einki skeivt í at bjóða ymsum kundum ymsar prísir. Tað er rættur, sum handilsmenn og fyritøkur hava**

TINGHELLA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Diskriminering er, umframt at vera lítið føroyskt, eitt ógvuliga negativt orð. Tað kann oftast setast í sambandi við ymiskt ógvuliga óheppið og oftani ólógligt.

Men í búskaparfrøðini og í handilsvinnuni er prísdiskriminering eitt púra vanligt hugtak, sum ikki er nógv annað enn fakligt.

Prísdiskriminering merkir, at tú selir eina vøru til ymsar prísir.

Tað eru tríggir hættir at fremja eina tílíka diskriminering. Special price for you fellir undir prísdiskrimenering av fyrstu grad. Ein søgan um ein kommunulækna, sum kennir øll fólkini í økinum, og harvið kann prísáseta eftir, hvussu nógv hann veit, at fólkini eru før fyri at gjalda. Tað næsta slagið av prísdiskreminering er at seta vørur saman ella í fleiri útgávum. Hetta sæst eitt nú í Office pakkanum hjá Microsoft. Tann triði hátturin er tann mest vanligi. Hesin hátturin býtir fólk upp í ymisk segment. Tað merkir, at ymsir bólkar fáa ymsar prísir.

### Ein rættur

Tað er sum so einki skeivt í at selja eina vøru til ymisk fólk til ymsar prísir. Hetta er eisini púra vanligt. Eitt nú nýggju prísirnir hjá Atlantsflog eru eitt dømi upp á prísdiskriminering, men tað er eingin, sum setir spurnartekin við hesar prísirnar.

Frá føroyska Kappingarráðnum frætta vit, at tað er ein rættur hjá fyritøkum at áseta ymsar prísir á henda hátt. Tað er eingin óvæntað niðurstøða, og á ongan hátt nakað serføroysk hugtak. Og tað finnast óteljandi nógv dømi um prísdiskrimering í Føroyum

### Kann vera ólógligt

So leingi eingin avtala er millum partarnar um at hava somu prísir ella at ein fyritøka misnýtir eina møguliga serstøðu, so er eingin til hindurs fyri at diskriminera í prísum. Prísdiskriminering sæst í øllum londum. ES lóggávan roynir tó at forða ymsum prísum til ymisk lond. Tað er stór ósemja um, hvussu heppið tað er við teimum ymsu prísunum. Ein fyrimunur verður sagdur at vera, at øll fólk kunnu keypa eina vøru við diskrimenerandi prísásetingum. Mest nýtta grundgevingin ímóti er, at fleiri fólk á henda rinda yvirprís, og tískil ikki fáa útnytta ein part av keypinum til onnur endamál, og hetta ikki er í tráð við marknaðartreytirnar.